# Hvalbiar Kommuna

| | | |
|---|---|---|
| **Dagfesting:** | 19.02.2018 kl. 17.30 | Stytt gerðabók |

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Niels Jacob Thomsen
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen (fyri Sten Spange Larsen)
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Suðuroyar Svimjifelag.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 10.000,- eins og undanfarin ár.

2. **Umsókn um peningaligan stuðul frá Nýggjársnevndini í Hvalba.**
   Søkt verður um stuðul til komandi nýggjárshald í Hvalba. Samtykt varð einmælt at játta stuðul kr. 20.000 í ár.

3. **Umsókn um fíggjarligan stuðul 2018 frá bóltfelagnum Royn.**
   Nevndin í Bóltfelagnum Royn søkir Hvalbiar Kommunu um stuðul á kr. 70.000 í 2018.

   **Fíggjarnevndin 19.02.2018:**
   Nevndin er samd um at mæla til at stuðla við kr. 70.000 í ár, treytað av, at tey skipa fyri bygda-stevnuni innanfyri hesa játtan.

   **Avgerð:** Samtykt varð einmælt at stuðla við hesari upphædd.

4. **Góðkenning av roknskapi fyri 2017 hjá Hvalbiar skúlabókasavni.**
   Roknskapurin hjá Hvalbiar skúlabókasavni varð einmælt samtyktur.

5. **Innkomin tilboð uppá telduútgerð.**
   Tilboð eru innkomin frá 3 veitarum uppá nýggjar iPaddar: Føroya Tele, Elding og Power Føroyar.

   **Fíggjarnevndin 19.02.2018:**
   Nevndin mælir bygdarráðnum til at taka av lægsta tilboðnum, ið er frá Power Føroyar.

   **Avgerð:** Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Power Føroyar.

6. **Økið frammanfyri bygningin hjá Suð. Norð. Bjargingarfelag í Nesi.**
   Kostnaðarmeting er gjørd í sambandi við at stoypa eitt øki á 280 m2 frammanfyri bygningin hjá SNB, har dekkið er 12,5 cm tjúkt. Samlaði kostnaðurin sambært hesum er kr. 74.206 u/MVG.

   **Vega- og havnanevnd 12.02.2018:**
   Nevndin hevur viðgjørt kostnaðarmetingina og mælir til, at kommunan rindar fyri tilfarið og at SNB stendur fyri arbeiðinum sambært avtalu.

   **Fíggjarnevndin 19.02.2018:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til, at arbeiðið verður gjørt sambært hesari kostnaðarmeting og at SNB ger arbeiðið.

   **Avgerð:** Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum frá Vega- og havnanevnd og Fíggjarnevnd.

   Janus Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 7 og nr. 8.
7. **Tilbygningur á matr. nr. 390a – Trolvirkið Bergið.**
   Skriv viðv. tilbygningi norðanfyri virkisbygning felagsins, har søkt verður um loyvi at umvæla henda.

   **Vega- og havnanevnd 12.02.2018:**
   Sambært skrivi, dagfest 31.10.2002, gevur Hvalbiar Kommuna Trolvirkinum rætt til at nýta nevnda bygning á matr. nr. 390a sum teir vilja. Út frá hesum metir nevndin, at málið er viðgjørt og avgreitt.

   **Avgerð:** Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá nevndini.

8. **Umsókn um byggiloyvi til klæðing av virkisbygningi á matr. nr. 390e, Hvalba.**

   **Tekniska nevnd 17.02.2018:**
   Sambært byggifrøðingi er ikki neyðugt at geva byggiloyvi til klæðing av bygningi.

   **Avgerð:** Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum frá nevnd og byggifrøðingi.

9. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.00

Janus Thomsen    Eir J. Norðberg    Magni Bertholdsen    Niels J. Thomsen

Niels Olaf Eyvindsson    Gunnhild Mortensen    Rúni Thomsen